


# Harley fyllir 105

mánadagur 24. september 2007

Harley Davidson er mest umrødda lívsstílsprodukt í heiminum síðan 1903. Eftir nýggjár verður nærum allur flotin endurnýggjaður, umframt alt tað, sum hartil hoyrir av útgerð, klæðum og aðrari framleiðslu við Harley-merkinum á. Harley fyllir 105 og ætlanin er at hátíðarhalda føðingardagin alt komandi ár. Nakrar av kendu súkklunum verða ikki so nógv broyttar, men hinvegin kanst tú keypa tær í føðingardagsliti. Størsta nýggjheitin er Nightster, ein 1200 kubikk egoistsúkkla, sum minnir um eina veteransúkklu. Ein nýggj Rocker verður heilt vist vælumókt, tí hon minnir um Softtail og annars nakað, sum kundi verið framleitt hjá American Choppers. Keypir tú eina slíka, so er eingin orsøk at byggja tína Harley um! XR1200 sportsmaskinan er ávegis til handlarnar, hon minnir nakað um eina japanska sportsmaskinu frá sjeytárunum, tá súkklurnar vóru gjørdar úr jarni og ikki plastikki og øll tøknin lá uttaná. Í Føroyum ber til at fylgja við, hvat kemur á marknaðin nær - og hvat tað kostar - á heimasíðuni www.hd.fo